FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Postboks 208
110 Tórshavn

Stjórnarskrivstovan
17. november 2020
Mál: 20/00485-4
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 38/2020

Svar til § 52 a fyrispurning nr. 38/2020 frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni

Fyrispurningur viðvíkjandi eftirliti við føroyskum og útlendskum fiskiskipum, settur landsstýrismanninum við fiskivinnumálum Jacobi Vestergaard (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, um tað er eftirlit við føroyskum fiskiskipum í Barentshavinum og um so er, hvussu hetta er skipað og hvør rindar?
2. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, um tað er eftirlit við útlendskum fiskiskipum í føroyskum sjógvi, og um so er, hvussu hetta er skipað og hvør rindar?
3. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er tørvur á at herða eftirlitið við útlendskum fiskiskipum, sum fiska á okkara leiðum? Um so er, hvussu nógv hægri játtan skal til fyri at hava nøktandi eftirlit í føroyskum sjógvi?

Svar:

Til spurning 1.
Eftirlitið við føroyskum skipum, sum reka fiskiskap í Barentshavinum, verður framt av norskum og russiskum myndugleikum.

Í sambandi við fiskiskap í russiska partinum í Barentshavinum verður eftirlit umborð á føroyskum skipum framt av russiskum eftirlitsfólkum, ið verða sett umborð á ávísum staði, tá skipini byrja túr. Eygleiðararnir fáa frían kost umborð, men skipið ber ongar lønarútreiðslur av eygleiðararunum.

Tá talan er um føroyskan fiskiskap í norskum sjógvi, verður eftirlit framt av manning frá norskum eftirlitsskipum (Kystvakten). Noreg ber útreiðslurnar av teirra arbeiði.

Vørn hevur eftirlit við, at einstaka skipið heldur seg innan fyri tillutaðu nøgdirnar at fiska í Barentshavinum.

Ministry of Fisheries

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

Til spurning 2.
Føroyskir myndugleikar (Vørn), saman við donsku verjuni, fremja eftirlit við útlendskum skipum í føroyskum sjógvi. Eftirlitsvirksemið hjá Vørn verður fíggjað á Løgtingsins fíggjarlóg. Danska verjan ber kostnaðin av teirra eftirlitsvirksemi.

Til spurning 3.
Vørn fremur og lagar eftirlitið til ta játtan, sum Løgtingið veitir sambært fíggjarlógini. Skal eftirlitið herðast, skal ein størri játtan til. Hesum hevur undirtøka ikki verið fyri seinastu árini.

Vørn hevur borið fram, at ynskiligt hevði verið at havt møguleika at kannað útlendsk skip meira, enn gjørt verður nú. "Tjaldrið" er bert mannað helvtina av tíðini, tí Vørn ikki hevur neyðuga játtan á fíggjarlógini at reka bæði "Brimil" og "Tjaldrið" við fullari manning.

Um "Tjaldrið" verður mannað alt árið og fer at luttaka aktivt í eftirlits- og hjálparuppgávum, metir Vørn, at meirútreiðslan hevði verið einar 5,8 mió. kr.

Landsstýrismaðurin kann sambært sjófeingislógini gera reglur um skyldu at hava eygleiðarar umborð at gera kanningararbeiði í sambandi við fiskiveiðu. Vørn hevur kunnað um, at ein skipan við eygleiðarum hevði stuðlað undir eitt munadyggari eftirlit.

Í sambandi við, at kunngerðirnar um fiskiskap hjá fremmandum tjóðum í føroyskum sjógvi verða endurnýggjaðar frá ársbyrjan 2021, verður umhugsað at víðka um møguleikarnar hjá Vørn at hava eygleiðarar umborð á fremmandum skipum.

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður